# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Realskúlamynd frá 1925

Mynd frá „realskúlaframsýningini 1916-66“ sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Mynd er av einum fimleikaliði í 1925.

**Aftara rað f.v.:** Leif Dahl, Carter Niclasen, Erik Petersen, Johanns Follend, Bodil Dahl, Ása Haraldsen, Jacobina Lava og Jákup Jacobsen (hjá Jørgeni).

**Fremra rað f.v.:** Elsebeth (hjá Jakku við Stein), Hanna Hansen (í Fjósi),Elsa Højgaard, Maria Restorff Jacobsen, Lina Hansen (á Landavegnum), og Lisa Joensen (hjá Pola)

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024 (mynd nr. 292).

*Myndaeigari: Ebba Petersen*



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum sýndu samkenslu, tá ið okkara kæra mamma, vermamma, omma og langomma

**Sylvia Hansen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.
Takk til prest, sangarar og kirkjutænarar.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til KFUK.
Somuleiðis takka vit tykkum, sum hjálptu til við ervinum, og øllum tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Hans Jákup, Páll, Eyðun og Marius**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymsan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá

**Snorri Patursson**
08. 08. 1924

varð borin til sín seinasta hvíldarstað.

Eingin nevndur eingin gloymdur.

Takk fyri.

*Kærar heilsanir*
**Osla og Gissur v. familju**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at morbróðir, farbróðir og vinur okkara

**Hans Petur Jespersen**
ættaður heiman av Sandi,
búsitandi í Tórshavn,

andaðist á Lágargarði mikudagin 12. november,
82 ára gamal.
Bønarhald verður á Lágargarði fríggjakvøldið kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni
leygardagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Sigrid, Alex, Kári og Jan**

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!